# Tað regnar jú kortini

**Tað ræður um at taka av teimum møguleikum, sum altjóðagerðin gevur, heldur enn at gremja seg um viðurskifti, sum tú einki ført gjørt við, sigur føroyski stjórin í Bullguard. Fríggjadagin tók hann móti Initiav-virðisløn frá Dansk Indurstri**

VIRÐISLØN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Claus Spigelhauer, formaður í Dansk Industri í høvuðsstaðarøkinum, segði talan vera um lætta uppgávu, tá Bullguard varð kosið sum móttakari av virðislønini*
*Myndamaður eitur: Claus Peuckert*

- Tað finnast fólk, sum siga seg vera ímóti altjóðagerð. Tað er eisini í lagi. Sjálvur komið eg úr Føroyum, og mær dámar als ikki regn. Tað er bara ikki nakað serligt, sum eg fái gjørt við tað, tí tað regnar kortini. Altjóðagerð er ein avbjóðing, sum vit noyðast at taka atlit til. Líka mikið hvør okkara støða er, so regnar tað jú kortini.

Soleiðis tók Heini Zachariassen til, tá hoyvíkingurin fríggjadagin tók ímóti donsku initiativ-virðislønini frá høvuðsstaðardeildini hjá Dansk Industri.

Virðislønin varð givin fyri marknaðarføringina og strategiina, sum Bullguard hevur nýtt í einum alt meira globaliseraðum heimi. Og Heini var eisini samdur í, at teir eru ein global fyritøka.

- Tað hava vit alla tíðina verið. Og vit hava alla tíðina sæð allan heimin sum okkara marknað. Vit vilja altíð keypa okkara tilfeingi, har vit fáa bestu góðskuna fyri pengarnar. Tí hava vit eitt nú menningardeild í Bucharest og søludeild í Danmark. Tað ræður alla tíðina um at fáa mest fyri pengarnar, sigur Heini.

Síðani stovnanina í 2001 hevur Bullguard verið í støðugum vøkstri. Fyritøkan, sum frá byrjan taldi tríggjar mans, hevur í dag 100 starvsfólk.

### Grundgevingingin

Í einum heimi, har tað gerst alt meira avgerandi at standa seg í altjóðagerðini hevur tað ovurstóran týdning, at fyritøkur tora. Ikki bara at bjóða av á stóra heimsmarknaðinum, men eisini at taka av teimum møguleikunum fyri samstarvi, sum altjóðagerðin hevur við sær.

Hetta er hornasteinurin í átakinum hjá Dansk Industri, sum á hvørjum ári letur serstaka virðisløn, nevnd Initiativprisen.

Í fyrstu atløgu eru tað lokalfeløgini hjá DI, sum læta virðislønir, og í høvuðsstaðarøkinum varð hendan fyri løtu síðani lætin Heina Zachariassen, sum er stjóri í KT-fyritøkuni, Bullguard.

- Tit hava síðani stovnanina í 2001 stríðst fyri at vinna fram í einum knallhørðum globalum marknaði, sum hevur verið eyðmerktur av stórum spælarunum við milliónum í rygginum. Og hetta er eydnast tykkum takkað verið hørðum arbeiði og tykkara evnum at hugsa øðrvísi og ótraditionelt, segði Claus Spigelhauer, formaður fyri DI í høvuðsstaðarøkinum.

- Tit hava frá byrjan hugsað nýtt, tá tit hava marknaðarført tykkum. Fyrstu árini millum annað Kazaa file-sharing og seinni hava tit verið millum teir fyrstu at nýta viral-marknaðarføring.

- Og samstundis hava tit eisini tikið av møguleikunum fyri altjóða samstarvi. Tit hava í dag eina menningardeild í Rumenia, skrivstour í Onglandi og samstarvsfelagar, veitarar og íleggjarar úr eitt nú Russlandi og USA. Alt í alt átøk, sum gjørdu tað lætt hjá okkum, tá vit skuldu kjósa móttakaran av virðislønini, segði Claus Spigelhauer á móttøkuni í dag.

## Maskotturin er livandi



*Hóast hann bert er ein ungur boxari, so hevur Sir Winston of Bullguard longu nú vunnið sær hópin av vinum kring allan heim*
*Myndamaður eitur: Claus Peuckert*

**Talan var um væleydnað PR-stunt, tá Bullguard fyri einum ári síðani vildi hava maskottin livandi**

VINNULÍV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani bullguard sá dagsins ljós fyri seks árum síaðani, hevur búmerkið hjá felagnum verið ein bulldog-hundur, sum stendur á varðhaldi. Hetta sum ímyndin av tí, sum forritið ger fyri teldubrúkaran.

Men ein teknaður maskottur var eftir øllum at døma ikki nóg mikið. Tí gjørdi leiðslan í felagnum av, at maskotturin skuldi verða livandi, og tí varð leitað eftir einum hvítum boxara. Hvussu hesin skuldi eita, var tó ikki greitt, at tí varð navnakapping útskrivað. Og hendan fekk góða undirtøku.

- Á tí einu myndini, sum vit nýttu til kappingina, stóð hundurin á júst sama hátt, sum Sir Winston Churchill ofta sást avmyndaður. Hundurin hevði tó ikki eina sigar, men ein pinn av onkrum slag í kjaftinum. Vit hava nógv viðskiftafólk í Onglandi, og ein rúgva av hesum hildu, at navnið á hundinum tí skuldi verða Winston. Okkurt uppskot kom tó um, at hetta skuldi vera Sir Winston o Bullguard, og tað hildu vit vera eitt frálíkt hugskot, sigur Heini Zachariassen.

Og illa ber til at siga annað enn, at átakið við hundinum hevur riggað framúr. Sir Winston hevur í dag egna heimasíðu www.bullguard.com/winston, har myndarøðir, ævisøga, blogs og spurnarkassi eru millum innihaldið, og hendan verður heilt nógv vitjað. Somikið nógv, at síðan av altjóða bloggarum er nominerað til virðisløn fyri at vera besta blog-síða hjá privatari fyritøku og til virðisløn fyri bestu djóra-blog.